## Adriano risabót



Brasilski álopsspælarin Adrino skikkar sær illa, og tað hevur fingið italska felagið Inter at geva honum eina ovurhonds stóra bót. Adriano møtti ov seint til fyrstu venjingina í ár, og tað kostar 1,1 millión krónur í bót. Adriano helt feriu í Brasil og kom seinni aftur til Italia enn ætlað. Fleiri aðrar ivamsamar hendingar hava verið við Adriano, sum hongur í klønum trái í Inter.

## Brúk fyri nógvum spælarum

Venjarin hjá Manchester City heldur, at felagið hevur brúk fyri fleiri nýggjum spælarum. City keypti um vikuskiftið Wayne Bridge úr Chelsea, men liðið var eyðmýkt í steypkappingini, har teir taptu 3-0 á heimavølli ímóti Nottingham Forest. - Vit hava brúk fyri fleiri spælarum, helst einar fimm spælarar afturat, og vit vóna, at teir kunnu keypast í januar, sigur Mark Hughes við SportingLife.

# Kyndil reisir seg spakuliga

**Púrasta óvæntað eydnaðist tað Kyndil at fáa fult í Hoyvíkshøllini í gjár. H71 spældi ikki serliga væl, og tá var lætt hjá vælleikandi havnarmonnunum at vinna seg longur burtur frá botninum. Kyndil eru nú ósigrað í tríggjar landskappingardystir**

HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*Fullkomuliga óvæntað fór Kyndil úr Hoyvíkarhøllini við báðum stigunum, tá teir vitjaðu hjá H71 sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

- Kyndil! Kyndil! Kyndil!

Frøin á Bárði Johannesen sigur alt. Við málinum til 25-23 køvir hann seinastu vónirnar hjá hoyvíkingum at fáa stig burturúr dystinum. Hann knýtir saman nevarnar og ger eitt ordiligt róp. Stutt eftir ljóðar seinasta bríkslið. Í einum stórum trunka síggjast glaðir og hoppandi grønir havnarmenn. Botnliðið er ósigrað í tríggjar dystir og hevur júst koppað grannunum úr Hoyvík.

Vónbrotnir hoyvíkingar á síðulinjuni taka seg til høvdið.

- Vit verða ongantíð føroyameistarar, tók ein til.

### Løgdu bragdliga fyri

Tað byrjaði nú væl hjá H71. Kyndil gav heimaliðnum alt ov nógv pláss í verjuni, og tvær ferðir var gjørligt hjá Janus Sørensen at renna ígjøgnum fyrstu løtuna. Men skjótt vendist. Gestirnir fingu tamarhald á verjupartinum, meðan málini skolaðu inn í hinum endanum. Flestu málini vóru eftir returbóltar og tilvildarligt spæl, men tað gjørdi tað sama. Øll mál telja líka nógv.

Serliga var landsliðsleikarin Janus Einar Sørensen stórspælandi. Hann stórtreivst millum stóru verjuleikararnar hjá H71, og var toppskjútti hjá Kyndil við átta málum.

Einu løtuna høvdu gestirnir bara tríggjar mans á vøllinum. Men hoyvíkingar dugdu illa at gagnnýta støðuna. Støðan í hálvleikinum var 13-11 til Kyndil.

### Stríðsviljin sigraði

- Kom nú her - út í hann! Væl vart!

Eyðkenni hjá kyndlamonnum seinastu nógvu árini hevur verið fyrimyndarligi stríðsviljin. Og tað var eisini hann, sum legði lunnar undir mest sannførandi avrikið hjá havnarfelagnum í hesum kappingarárinum. Serliga dugdi Bárður Johannesen, sum hoyvíkingar fleiri ferðir gjørdu brotskast móti, væl at stuðla undir viðleikararnar. Spælið hjá gestunum var ikki serliga flott í løtum, men teir lótu ikki H71 koma nærri leiðsluna. Teir hildu fast allan dystin á tamb. Ikki fyrr enn í seinastu minuttunum fingu hoyvíkingar spenning í dystin, men Kyndil endaði omaná, og vann við tveimum málum – 25-23.

Hóast grønu havarmenninir hava ligið í tungum sjógvi alt árið, koppaðu teir FM-kandidatinum í egnari holu. Men tað kann H71 fyrst og fremst takka sær sjálvum fyri. Spælið hekk als ikki saman, og verjan og Kyndils stóð seg væl. Men hoyvíkingar mistu ikki serliga nógv í oddastríðnum. Málið er framvegis finalupláss, og júst sum undan dystinum, so eru tað framvegis tvey stig, sum skilja Neistan og hoyvíkingar.

## – Kunnu takka okkum sjálvum

Tað var ein vónbrotin og fámæltur Dánjal Torgarð, sum Sosialurin fekk orðið á eftir dystin í gjár. Hoyvíkingar vóru ikki nóg avgjørdir, og tað kostaði dýrt.

- Vit kunnu bara takka okkum sjálvum fyri, at vit ikki vunnu.

Vóru tað tit, sum vóru vánaligir, ella hvussu?

- Ja, tað var tað. Sjálvandi skal einki takast frá avrikinum hjá Kyndli. Men tað vóru fyrst og fremst vit, sum vóru vánaligir, sigur Dánjal Torgarð.

Tá liðini hittust í fyrsta umfari í ársins útgávu av hondbóltskappingini vann H71 við heili 14 málum. Men hesir dystirnir kunnu als ikki samanberast, slær landsliðsleikarin fast.

- Kyndil hevur nógv nýtt fólk, og hava av tí sama tikið seg nógv fram. Hetta var ein heilt øðrvísi dystur, men tað broytir ikki, at vit eru vónbrotnir. Hetta var ikki nøktandi, sigur Dánjal Torgarð, sum staðfestir, at hoyvíkingar framvegis hava góðar vónir um finalupláss.

**-uni**

### FAKTA um dystin

**H71-Kyndil 23-25 (11-13)**
**10 min:** 5-4
**20 min:** 7-10
**40 min:** 15-15
**50 min:** 18-20
**Málskjúttar**
**H71:** Dánjal Tórgarð 7(2), Poul Kjartan Dam 5, Janus Sørensen 4, Regin Joensen 2, Danni Syhler 2, Esbern Patursson 1, Bjarni Sørensen 1, Bárður Brimvík 1
**Kyndil:** Janus Einar Sørensen 8(3), Bárður Johannesen 6(2), Hans Áki Dal-Christiansen 4, Høgni Klein 2, Tummas Pauli Hanusarson 2, Andreas Sólsker 1, Rani Ellingsgaard 1, Erlendur Johannesen 1
**Brotskøst:** H71 3, Kyndil 7
**Útvísingar:** H71 3, Kyndil 5

## Claus Rasmussen gevst

**Claus Rasmussen boðar í dag frá, at hann gevst sum venjari hjá StÍF eftir hetta kappingarárið**

HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Heimasíðan hjá StÍF skrivar í dag, at danin Claus Rasmussen ikki ynskir at halda fram í venjarastarvinum eftir hetta kappingarárið. Orsøkin er fyrst og fremst, at hann ætlar at nýta meira tíð til familjuna.

- Hann lat samstundis eina hurð standa á glopp fyri, at hann møguliga kundi venda aftur til StÍF einaferð í framtíðini, skrivar heimasíðan.

Í StÍF hava tey verið væl nøgd við avrikini hjá Claus Rasmussen. Hann varð settur sum venjari undan farna kappingarári.

StÍF-KÍF 30-22

## Aftur á beint

StÍF hevur ikki havt tað serliga lætt seinastu tíðina, men í gjár bragdaði aftur hjá liðnum.

KÍF, sum er niðast í Atlantic Airways-deildini, vitjaði, og her eydnaðist strandingum at taka sær av báðum stigunum.

Við sigrinum heldur StÍF framvegis fast í lítlu vónini um at røkka einum finaluplássi í kappingini. StÍF hevur nú fýra stig upp til Neistan, sum er á øðrum plássi í kappingini. Og júst Neistin er mótstøðuliðið hjá StÍF í komandi uppgávuni, sum eisini verður í høllini á Skála.

**-mørk**